# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba hjá børnum
# Krabbi í eygum og orbita - retinoblastom

## Sjúkueyðkenni, ið elva til illgruna um retinoblastom hjá børnum

Illgruni um retinoblastom hjá børnum íkemur, tá eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkueyðkennum/viðurskiftum eru tilstaðar:

- Retinoblastom í nærmastu familju (foreldur og systkin)
- Hvít pupilla (leucocori)
- Skeitan, sum í sjáldsomum førum er orsakað av retinoblastom (hesi finnast oftast hjá eygnalæknum)

Grundaður illgruni íkemur tá funnið verður:

- ífylla í eyganum uttan aðra sikra diagnosu
- Inflammatión í eyganum, buftalmi ella bløðing í eyganum, har illgruni er um retinoblastom

Lækni, ið fær illgruna um retinoblastom hjá barni, skal beinanvegin senda ávísing til krabbaútgreining í Cosmic og ringja til vakthavandi barnalækna

## Ávísingin

Ring fyrst til barnalækna um barnið

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Pædiatri - Illgruni um restinoblastom hjá barni" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026